

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 08 - 2012

# Marta, Ragnar og Annemie funnu oljuna

Í sambandi við at nýggir næmingar byrja á Fróðskaparsetrinum í hesum døgum, var innleiðsludagur á Østrøm í dag. Eitt av tiltøkunum var ein stór oljuleitingarkapping nevnt PetroUniversity, sum Simprentis skipaði fyri í samstarvi við FOÍB og sum var stuðlað av Statoil. Endamálið var at kunna um lestrar- og arbeiðsmøguleikar í oljuvinnuni og at geva luttakarunum eina betri fatan av avbjóðingum og møguleikum í oljuleiting, Teir 80 luttakararnir vóru býttir í bólkar, og hvør bólkur var eitt oljufelag í lærisimuleringini OilSim. Avbjóðingin var at finna rakstrarverdar nøgdir av olju og gassi. Bólkarnir greinaðu magnetiskar, gravimetriskar, seismiskar og umhvørvisligar kanningar og bólkarnir kappaðust og samstarvaðu um at fáa tillutað bestu leitiloyvini, eyðmerkja leitimið og boristøð, bora leitibrunnar og staðfesta, um møgulig fund vóru rakstrarverd. Kappingin varð hørð, og vinnarar gjørdust Marta N. Hansen, Ragnar Djurhuus og Annemie Magnussen í bólkinum Oil4Fun.